

*Tá ongin vegur er aftur, og óttin fyri deyðanum gerst ein dagligur partur av lívinum, er umráðandi at hava tryggar karmar. Soleiðis er ikki fyri ein stóran part av teimum føroyingum, sum eru deyðasjúkir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Olsen, at um tað skal vera gjørligt at vera verandi sum sjúkur í egnum heimi, so krevst, at tað fyrst og fremst finnst døgnvakt í nærverkinum. Eisini er tað umráðandi, at sjúkrarøktarfrøðingar í nærverkinum fáa eftirútbúgving innan palliativa (linnandi) umsorgan og pínuviðgerð. Tá tað snýr seg um krabbameinssjúkingar eru marginalarnir sera smáir innan medisinviðgerð.

### Vert at hugsa um hospice

Spurdur um hvussu hansara dreymur fyri framman sær út, sigur Jákup N. Olsen, at hann ynskir, at hospice loysnin, við palliativari eind og palliativum toymi, kemur at gerast veruleikii í Føroyum.

- Eg kundi hugsað mær, at sjúklingar kundu gjørt brúk av til dømis fysioterapeuti, kostráðgeva, sálarfrøðingi, presti, sosialráðgeva, meðan sjúklingurin enn er í egnum heimi. At eitt palliativt toymi frá sjúkrahúsinum arbeiddi saman við nærverkinum, har toymið so kundi innskrivað sjúklingin beinleiðis á sjúkrahús um neyðugt. Tryggleikin her liggur avgjørt í einum tílíkum nærverki, sigur Jákup N. Olsen.

Nú var hospice sum óheft at sjúkrahúsinum valt frá í fyrsta lagi; millum annað tí kostnaðurin var hægri enn á hinum loysnunum. Hvussu sært tú hendan tørvin í dag?

-Tað er meira aktuelt í dag við hospice, tí øll gerast eldri. Harvið fáa fleiri fólk eisini krabbamein, sum annars høvdu verið deyð. Fleiri gerast sjúk, tí vit liva longri. Og fleiri av teimum sum hava fingið krabbamein í ungum árum, liva eisini longri við sjúkuni. Tí veksur tørvurin eftir palliativari umsorgan og viðgerð.

Fyrimunurin við at eini tílíkari skipan er, at sjúklingurin upplivir ein samanhang í viðgerð, líkamikið um hann er innlagdur ella heima.

Palliativt toymi er ein tvørfakligur bólkur við serfrøðingum, hvørs uppgáva er at ráðgeva starvsfólki, sum eru um sjúklingin og í summum førum eisini avvarðandi. Bólkurin hevur eisini eina stuðuls- og ráðgevandi góðskustýringsuppgávu við atliti til arbeiðið á palliativu eindini. Í hesum bólkinum eigur upprunaliga at vera ein onkologur (serútbúgving innankrabbamein), onkologsjúkrarøktarfrøðingur og narkosulækni, sum umsita visitatiónina. Harafturat eru prestur, sosialráðgevi, fysioterapeutur, kostráðgevi og sálarfrøðingur knýtt at toyminum.

Palliativ eind er ein sjálvstøðug deild á sjúkrahúsi við egnum seingjarplássum og egnum starvsfólki við servitan innan palliatión, ið er ætlað sama málbólki.

Hospice er ein sjálvstøðugur stovnur, bæði fysiskt og fíggjarliga, ið liggur uttan fyri sjúkrahúsverkið. Høvuðsendamálið er at veita røkt og linnandi umsorgan til krabbameinssjúklingar, men eisini onnur kronisk sjúk kunnu vera har. Einasta treyt er, at sjúklingurin skal ásanna, at hann ikki gerst frískur.

### Tilmæli um hospice í Føroyum

Í ár 2000 skundaði Sjúkrahúsráðið fyri øll trý sjúkrahúsini undir Landsstýrið til tess at fáa betra viðurskiftini fyri krabbameinssjúklingar.

Í 2001 lat Helena Dam á Neystabø – táverandi landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum – tilmæli um at kanna møguleikan fyri at seta hospice á stovn í Føroyum. Hetta fyri at bøta um korini hjá kronisk sjúkum og doyggjandi við serligum atliti til krabbameinssjúklingar.

Í arbeiðsbólkinum vóru millum annað núverandi sjúkrarøktarfrøðingastjórin, ein serútbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur, umboð fyri heimarøktina, formaðurin í sjúkrahúsráðnum, sum eisini var í nevndini í krabbameinsfelagnum, og ein medisinskur lækni.

Sambært tilmælinum skuldi arbeiðsbólkurin kanna tørvin á palliativari umsorgan í Føroyum, og hvussu hesin kundi nøktast. Meðan danir hava havt hetta slag av umsorgan síðani fyrst í 90'unum við góðum royndum, ynskti eitt nú Føroya Felag móti Krabbameini, at gongd skuldi koma í her heima eisini.

Her skuldi kannast, um tørvurin kundi nøktast einans innan eitt sjúkrahús, ella um øll sjúkrahúsini kundu vera við. Ein møguleiki var eisini heimahospice (har fólk doyggja heima) og/ella at stovnseta eitt hospice í Føroyum eisini.

Fyrimunir og vansar vóru kannaðir, eins og starvsfólkatørvur og sjúklingabólkar skuldu fastsetast. Endin var, at hospice politiskt varð valt frá, og sjúkrahúsleiðslan valdi at royna eitt palliativt toymi at byrja við. Ætlanin var, at hetta toymið seinni eisini kundi vaksa til eina seingjardeild.

### Altjóða virðisgrundstøði

Tilmælið tók støði í lýsingini hjá WHO, sum er felagsskapur undir S.T. Hetta til tess at betra mest møguligt um heilsustøðuna likamliga, sálarliga og í felagslívinum í sambandi við sjúkur.

Felagsskapurin lýsur hugtakið »palliativ care«. Hetta at viðgerð, umsorgan og røkt er tann aktivi, samlaði innsatsurin til sjúklingin, sum ikki longur kann gerast frískur, og har endamálið er at geva sjúklinginum og familjuni teir bestu møguleikarnar.

### Palliativar skipanir í Danmark

Í Danmark eru seks hospice, har tað fyrsta lat upp í 1992. Afturat hesum eru palliativar eindir (seingjardeildir) á trimum sjúkrahúsum, ið eru Bispebjerg, Århus og Herlev. Palliativ toymi eru í fleiri regiónum við ymiskum tilknýti til sjúkrahús og nærumhvørvi. Summi hava beinleiðis samband við sjúklingarnar eftir eini ávísingarskipan. Hini norðurlondini hava eisini líknandi skipanir.

Jákup N. Olsen var formaður í arbeiðsbólkinum sum gjørdi »tilmæli um hospice funktión í Føroyum í 2001«. Tilmælið kom fram til, at fleiri loysnir sum hospice, sjúklingaeind á sjúkrahúsinum og eitt toymi vóru allar vóru brúkiligar loysnir. Politiskt var hospice valgt frá, og leiðslan á Landssjúkrahúsinum valdi at byrja við einum toymi og so víðka við seingjareind seinni.
Jákup N. Olsen er formaður í sjúklingaráðnum, sum var sett á stovn í 2005 av landstýrismanninum í almanna- og heilsumálum, Hans Paula Strøm. Eisini hevur Jákup N. Olsen verið í fyrrverandi sjúkrahúsráð líka síðani 1998, tá øll trý sjúkrahúsini vóru saman.
Endamálið við sjúklingaráðnum er at vera málgagn hjá sjúklingum mótvegis landsstýrismanninum í viðgerð av málum, sum hava generellan og prinsipiellan týdning fyri veitingar til sjúklingar á sjúkrahúsinum. Eisini at veita ráð um tey mál, sum landsstýrismaðurin leggur fyri ráðið. Harafturat skulu fíggjarætlanir fyri øll trý sjúkrahúsini leggjast til ummælis í ráðnum.
Sum nevndarformaður í Føroya Felag móti Krabbameini síðani 1992, hevur Jákup N. Olsen eitt gott innnlit í støðu teirra krabbameinsraktu.

200 nýggir krabbatilburðir koma hvørt ár
Kelda: Føroya Felag móti Krabbameini

119 doyðu av krabbameini í 2006
Í fjør var samlaða talið av deyðum var 422
Kelda: Almanna- og heilsumálaráðið

# Praktiskar fyriskipanir eitt krav

**Nærverksstjórin vil fegin royna nýggjar leiðir, so deyðasjúk kunnu fáa samanhangandi viðgerð og umsorgan**

DEYÐASJÚK
*Anna Maria Joensen*
*amac@post.olivant.fo*

Áðrenn Nærverkið av álvara ger av, um tey kunnu klára eina samdøgurskipan í tættfólkaða høvuðstaðarøkinum, má heimatænastan fyrst gera eina royndarskipan. Ætlanin er at royna eina tílíka skipan longu í ár, sigur Mary J. í Garði, stjóri í Nærverkinum.

Tann stóri trupuleikin hjá álvarsliga sjúkum ella doyggjandi er, at teimum tørva uppsýn bæði dag og nátt. Hetta er serliga galdandi fyri tey, sum eru ov sjúk at sleppa á røktarheim og sum heldur ikki eru í aktivari viðgerð á sjúkrahúsi, tí hvar skulu tey fara? Hesin bólkur hevur oftani fleiri ymisk brek og sløg av sjúkum, men bólkurin kann eisini umfata krabbameinssjúklingar.

Heimatænastan er sera væl egnað til viknaði menniskju, sum ikki eru ov sjúk til at klára seg um náttina. Skipanin er smidlig, so tørvurin hjá tí einstaka verður gingin á møti. Fólk fáa hjálp til matgerð, reingerð, klæðnavask og annað og hugt verður eftir, hvørjar uppgávur tey ikki kunnu klára at gera sjálvi, men hetta er ikki nóg mikið, tá støðan versnar. Úrslitini fyri henda serliga sjúka bólkin gerst tá, at tey noyðast at ferðast millum heimið og sjúkrahúsið, líka til deyðin kemur. Ongin kann rættiliga taka ábyrgdina av heildargongdini, tí ongin heild er í.

Sjúklingarnir sjálvir eru undir stórum trýsti eins og tey avvarðandi. Við nógvari pínu til dagligt stúra tey fyri, hvussu ringt tað man fara at vera, tá deyðin skal koma, og nær hann fer at koma. Og hvat nú um ein doyr einsamallur heima og ikki klárar at ringja eftir hjálp? Ella kanska doyr mitt ímillum heimið og sjúkrahúsið í sjúkrabili?

Mary J. í Garði ger vart við, at tað ikki bert snýr seg um at uppfrætta náttarvakt til tess at loysa trupuleikan.

- Tað skal eisini vera møguligt at vera um tann doyggjandi alt samdøgrið. Vit tosa um eitt serligt slag

*Framhald á næstu síðu*